FAROESE DISABILITY ORGANIZATIONS

Barna- og Útbúgvingarmálaráðið
J.H. Schrøters gøta 7
Postboks 3279
FO-110 Tórshavn

Staður: Tórshavn
Dagfesting: 31.01.2024
J. nr. (MEGD): 701-2-2024
Ummælistíð: 08.01.2024 - 05.02.2024
J. nr (BUMR): 23/21201

Hoyringarskriv viðvíkjandi
Uppskoti um løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um barnavernd

(Ásetingar um at boða frá, fyribyrgjandi fyriskipanir, stuðul til foreldramyndugleikan, avgerðir um ávís viðurskifti hjá barninum og um at flyta eitt barnaverndarmál)

MEGD takkar fyri høvið at senda hoyringarskriv til hetta uppskotið.

---

1. Yvirskipað tekur MEGD undir við, at broytingar verða gjørdar í barnaverdarlógini, sum skulu vera til barnins besta, og sum kunnu hava týdning fyri menningina, trivnaðin og heilsuna hjá børnum, eisini teimum, ið bera brek. Broytingar kunnu tó gerast, sum betra um uppskotið á ávísum økjum. Niðanfyri eru okkara viðmerkingar til einstøku ásetingarnar skipað í teirri rød, uppskotið er sett fram.

2. **Til § 1 – nr. 1:** Upplýst verður at endamálið við nýggju ásetingini í § 14, stk. 7 er at útvega neyðugt heimildargrundarlag smbrt. dátuverdarlógini, so, at fakfólk hjá tí almenna og tey sum útinna virksemi fyri tað almenna innan barna- og ungdómsøkið í Føroyum, kunnu boða donskum kommunum frá ivasomum viðurskiftum, tey gerast varug við.

3. Virksemið hjá fakfólki á barna- og ungdómsøkinum er eisini regulerað av fyrisitingarlógini (FL), sum hevur ásetingar um víðarilatan av upplýsingum til annan myndugleika sbr. §§ 27-30. FL er tó bert galdandi fyri virksemið hjá myndugleikunum í Føroyum, sbr. § 1. Uppskotið

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

nevnir tó einki um FL og hvørt hendan lógin er viðkomandi, tá ið myndugleikar í Føroyum senda upplýsingar av landinum.

4. Nýggja ásetingin verður sett inn inn í kap. 3 í barnaforsorgarlógini, sum er um fráboðanarskyldu. Í hesum føri er tó ikki talan um nakra skyldu men ein rætt, har fakfólk í Føroyum *kunnu* boða donskum kommunum frá, gerast tey varug við at børn og ung, búsitandi í Danmark, mistrívast; hetta so at neyðugar fyriskipanir kunnu setast í verk fyri tey.

5. Spurningurin er hví hetta er gjørt til ein valmøguleika heldur eina skyldu, soleiðis sum endamálið við kap. 3 leggur upp til. Lógarviðmerkingarnar siga, at rætturin at boða frá gongur fram um tagnarskylduna hjá starvsfólkinum, sum ikki kann skiljast øðrvísi enn, at tey – eins og aðrir fráboðarar – eru fevnd av § 14, stk. 1. Tað tykist kortini ógreitt, um tey annars eru fevnd av hinum ásetingunum í § 14, eittnú um at fráboðarin kann vera ónavngivin (§ 14, stk. 2, seinna punkt) og formkrøvini til viðgerð av fráboðanum (§ 14, stk. 4-6). Hetta kann gerast greiðari.

6. Fyri rættartrygdina – bæði hjá kærara og teimum kært verður um – er eisini best, at lógaruppskotið beinleiðis upplýsir *hvat* dátuverdarlógin inniber, tá ið persónsupplýsingar (fráboðanin) verða latnar til danskar kommunur, t.e., at viðgerðin skal vera saklig og neyðug, og at krøv eru um at kunna skrásetta um viðgerðina og at viðkomandi hevur rætt til fáa innlit eftir dátuverdarlógini.

7. **Til § 1 – nr. 2 og 3:** Upplýst verður, at nýggja ásetingin hevur til endamáls, at útvega *breiðri rammur í mun til at málrætta hjálpina,* og er *ein nágreining av galdandi lógarviðmerkingum og siðvenju*. Samstundis er ætlanin, at tann nýggja ásetingin skal vera millum tær fyriskipanir, sum barnaverndin, um tað er neyðugt, kann seta í verk, uttan samtykki frá foreldramyndugleikanum – uttan at júst hetta við undantakinum verður nærri útgreinað.

8. Slíkar fyriskipanir eiga tó altíð vera neyðugar og mugu ikki fara út um mark. Sum felag, ið umboðar fólk við breki, leggur MEGD dent á, at barnins tørvur, sum er staðfestur bæði í altjóða og innlendis lóggávu, er avgerðandi í umsitingini av barnaverdarmálum, og at børn, ið bera brek, eisini hava rætt til serliga verju og umsorgan, sbr. gr. 7 í Brekrættindasáttmálanum hjá ST.

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

9. Eisini vil MEGD leggja dent á, at fólk við breki hava ein rød av rættindum, m.a. rættin til eitt sjálvstøðugt og inkluderandi samfelagslív (gr. 19), virðing fyri privatlívi (gr. 22) og fyri heimi og familjulívi (gr. 23). Tað er tí umráðandi, at myndugleikarnir, tá ið støða skal takast til fyriskipanir, taka hesi rættindi við í metingina og m.a. taka støðu til, hvørt foreldur og familjur við breki hava fingið tað hjálp, veitingar og tænastur, tey hava krav um. Áðrenn ógvuslig myndugleikainntriv verða gjørd, sum ganga teirra privatlívi, integriteti og familjulívi sera nær. Í hesum sambandi vilja vit m.a. vísa til niðanfyrinevndu ásetingar í ST-sáttmálanum (við okkara undirstriking):

- Limalondini skulu tryggja rættindi og skyldur hjá fólki, sum bera brek, viðvíkjandi verjumálum, tilsjón umsiting av ognum, barnaættleiðing ella tílíkum, tá ið hesi hugtøk eru í tjóðarlógum; í øllum førum skulu atlitini at barnsins tørvi hava størsta týdning. **Limalondini skulu veita hóskandi stuðul til fólk, ið bera brek, tá ið tey skulu røkja sínar skyldur sum barnauppalarar**. (Brekrættindasáttmálin gr. 23 (2))

- Limalondini skulu tryggja børnum, sum bera brek, javnrættindi í familjulívi. Til tess at fremja hesi rættindi og til tess at fyrbyrgja at børn, sum bera brek, verða duld, svikin, vanrøkt og avbyrgd, **skulu limalondini veita børnum, sum bera brek, og teirra avvarðandi skjóta og umfatandi upplýsing, tænastur og stuðul**. (Brekrættindasáttmálin gr. 23 (3)

10. Til § 1, nr. 4: Tað tykist ógreitt, um tað eru allar ásetingingarnar í § 15, sum tann nýggja ásetingin í § 19, stk. 5 vísir til ella bert ásetingina í § 15, stk. 1. Av innihaldinum skilst, at tað er § 15, stk. 1, sum er viðkomandi, við tað, at nýggja § 19, stk. 5 verður grundað á *samtykki* frá foreldrunum eins og galdandi er í § 15, stk. 1, har fyriskipanir, sipað verður til, eisini eru nevndar. Hinvegin kann undantakaksreglan í § 15, stk. 2 um rættin at fremja fyriskipanir uttan samtykki neyvan vera viðkomandi í hesum sambandi, við tað at *samtykki* er fortreytin fyri nýggju ásetingini í § 19. stk. 5, sí ” Barnaverdin kann, við samtykki (…)”. Hetta kann vera greiðari.

- **Til § 1 – nr. 5:** Talan er um eina rættuliga víðfevnda broyting sammett við heimildirnar sum barnaverdarnevndin hevur í dag, har heimildirnar eru avmarkaðar til dagligu umsorganina fyri barninum (t.e. veruligt myndugleikavirksemi, sí lógarviðmerkingarnar). Við nýggju ásetingini fær myndugleikin, uttan foreldrasamtykki, heimild at taka avgerð um sera persónlig viðurskiftini hjá barninum – um hetta er neyðugt í mun til endamálið við heimsetan av barni. MEGD tekur undir við, at tað kunnu vera familjustøður, sum eru so truplar, at neyðugt er við nevndu heimild, serliga tá ið talan er at verja børn við breki, sum er serliga útsett. Barnsins besta, barnins menning, trivnaður og heilsan hjá barninum

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

skal altíð standa í miðdeplinum. Vísandi til omanfyrinevndu ásetingar í altjóða lóg vilja vit hinvegin mæla til, at farið verður fram við hóvsemi, so at nýggja heimildin ikki tekur grundarlagið undan foreldramyndugleikanum. Tískil er tað umráðandi, at heimildin hjá barnaverndarnevndini at taka avgerðir um persónligu viðurskifti hjá børnum verður

- avmarkað til endamálið og so ítøkilig sum gjørligt,
- ikki fer longri enn neyðugt fyri at fremja endamálið
- bert verður nýtt, tá ið allir aðrir møguleikar eru royndir
- tekur fyriliti fyri, at sambandið millum barn og foreldur ikki viknar ella slitnar
- fyri, at foreldur, ið bera brek, verða hoyrd smbrt. fyrisitingarlógini áðrenn avgerðir verða tiknar og
- fyri, at foreldur og familjur, ið bera brek, fáa neyðugan stuðul, hjálp og tænastur

11. Nevnda áseting er ikki nóg neyv og avmarkað, sí m.a. orðingina «v.m.» sum letur upp fyri óendaligum møguleikum. Summir av møguleikunum, ið verða nevndir í lógarviðmerkingunum eru heldur ikki við í lógarásetingini, t.d. avgerð um konfirmatión og dóp. Samumtikið kann heimildin sostatt lýsast betri, so at inntriv kunnu gerast, men við neyðugum atliti til rættartrygdina.

12. **Til § 1 - nr. 7:** MEGD skilur, at tað kunnu vera serligar støður, har mál eru blivin so fastlæst, at frægasta loysnin kann vera at flyta málið til aðra barnaverdarnevnd at umsita. Tó má ansast eftir, at hetta ikki verður misnýtt av foreldrum, at skáka sær undan trupulleikum, so, at barnið ikki fær tað bestu hjálp og stuðul, tað hevur krav um. Verður heimild givin, at flyta barnaverdarmál í serligum førum, mælir MEGD myndugleikunum til at virða og hava í huga, at fólk og familjur við breki framhandandi kunnu fáa ta serligu hjálp, tænastur og stuðul, sum tey hava rætt til smbrt. altjóða og innlendis lóg.

Vinarliga
Dánjal Højgaard, løgfr. ráðgevi
MEGD

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo